## Sølvi in action

Tá einstaklingakappingin í judo var, stóð læknin Sølvi Winther Olsen og fylgdi við uttan fyri motturnar, klárur at leypa inn, um onkur av føroyingunum kom illa fyri. Og Sølvi slapp eisini at royna seg, men tíbetur var tað ikki ein føroyingur, ið hevði meitt seg. Tað var ein maður frá Gibraltar, sum lendi skeivt aftaná eitt kast og tók seg til nakkan. Sølvi var skjótur inni saman við læknanum á staðnum, og aftaná greiddi Sølvi frá, at judoíðkarin hevði meitt sær vøddan, sum gongur frá oyranum og niður móti østbeininum.



## Búgvi breyt nøsina

Búgvi Poulsen var so óheppin at bróta sær nøsina, tá hann bardist finaludyst móti einum manni frá Prince Edvard Island. Eftir sjálva kappingina kom Búgvi á tal við henda mannin, sum vísti seg at vera plastikk skurðlækni. Hann segði skemtandi við Búgva, at hann ikki var komin fyri at skaffa kundar, men nú kundi hann saktans orðna nøsina hjá Búgva. Eisini Ragnar við Streym gongur runt við brotnari nøs. Henda varð tó sett upp á pláss mánadagin fyri viku síðani.

# Bardust til seks

**Eina gull-, fýra silvur- og eina bronsumedalju háløðu føroysku judoíðkararnir heim, tá teir bardust í einstaklingakapping**



*Ragnar bardi seg fram í finaluna, sum hann tó tapti fyri finskum landsliðsleikara*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

JUDO

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað var hart og kontant. Tað var stutt og greitt. Soleiðis ber til at taka saman um samlaða føroyska avrikið, tá judoíðkararnir vóru á mottuni sunnudagin.

Felags fyri allar íðkararnar var, at teir løgdu bragdliga fyri. Fóru hart í mótstøðumannin, vunnu sær gott tak og honum og syftu hann í gólvi. Teir dystirnir, sum fóru upp um eina minuttin, kundu teljast á einari hond. Ein tilvitaður taktikkur frá judoíðkarunum, um at seta seg sjálvar í respekt frá byrjan. Vísa styrki og at teir ikki óttaðust nakað sum helst.

### Drúgt hjá Christoffur

Kappast var í øllum vektflokkum í senn, men um vit byrja í lættasta endanum, so skulu vit til menninar, sum viga undir 60 kg. Har bardist Christoffur Olsen, sum seinastu vikurnar hevur strítt seg niður í vekt fyri at enda í hesum vektflokki. Hansara dystur fyrsti dystur var ein av teimum fáu, sum vardi eina løtu. Hóast hetta hevði Christoffur fult tamarhald á dystinum, sum hann førdi við trimum koka og einum wazari, áðrenn hann vann við hipon, tá hann tveitti mótstøðumannin í gólvi við einum sonevndum "flúgvandi japanara", har Christoffur legði seg aftur av og tveitti mannin upp um og aftur seg við beinunum.

Næsti dystur hansara var eisini av teimum drúgvu, har Christoffur tó aftur hevði tamarhald á støðuni. Hann vann sær tvær yoku, eina wazari og so aftur eina yoku, áðrenn hann fekk sína næstu wazari og sigurin og finalusessurin var tryggjaður.

Finaludysturin var móti einum íðkara frá Rhodos. Aftur hesaferð var talan um eina dyst av longra slagnum, tá allir fimm minuttirnir vórðu brúktir. Tá avtodnaði hevði maðurin frá Rhodos tryggjað sær eina yoku og eina koka, sum var nóg mikið til at vinna á Christoffur, sum einki kast fekk at sita.

### Føroysk finala

Næsti vektflokkurin var – 66 kg. Har vóru tvey føroysk umboð í Jógvan Páll Kristiansen og Alex Joensen. Hesin seinni kom víðari uttan dyst, meðan Jógvan Páll syfti sín mótstøðumann út við einum frágera góðum lágum "pick-up"-kasti, har mótstøðumaðurin verður lyftur upp um herðarnar og syftur niður í gólvið.

Í seinna dysti sínum var uppskriftin hin sama sum í fyrra, og hesaferð var tað ein við svarta belti av Rhodos, sum Jógvan Páll Kristiansen sendi niður í gólvið og út úr kappingini. Finalusessurin var tryggjaður, men spurningurin hvør mótstøðumaðurin fór at vera.

Svarið fekst í næsta dystinum, Alex Joensen bardist. Har basti Alex einum manni av Gibraltar, tá hann stranguleraði hann. Áðrenn tað hevði hann eisini skaffa sær eina wazari, og soleiðis gjørdist talan um eina reina føroyska finalu.

Hendan finalan gjørdist eins og teirra undanfarnu dystir lutfalsliga stutt. Alex vann við einum fínum hipon-kasti og fyrsta gullmedaljan var tryggjað.

### Beiskt silvur

Í vektflokkinum –73 umboðaðu Hjalmar Johannesen frá Norðskála og Áki Davidsen úr Kvívík Føroyar. Áki tapi sín fyrsta dyst, men vann tann næsta. Tað var nóg mikið til, at hann kundi berjast um aðra bronsuna, men her gjørdist kvívíkingurin ov stuttur.

Hjá Hjalmar gekk nakað betri. Hann kom víðari uttan dyst, í vann síðani á einum manni frá Sarema, tá hann tók hann við tveimum wazari. Síðani var mótstøðumaðurin ein frá Gibraltar. Hesin kom á odda við einari yoku, men Hjalmar svaraði skjótt aftur og sendi mannin í mottuni við einari hipon.

So stóð finalan á skránni. Henda gjørdist ein heldur beiskur biti hjá honum at svølgja. Hjalmar tapti dystin, men var tað eftir serstakliga vánaligt dómaraavrik. Maðurin frá Gibraltar royndi at tveita Hjalmar, sum fekk krøkt beinið í hann, og forðaði kastinum. Haraftrat vóru teir uttan fyri loyvda øki, tá kastað varð. Dómarin ivaðist væl og leingi, men hjálpardómarar hansara lótu sum einki, og so valdi hesin at geva hinum sigurin.

### Silvur til Búgva

Einasta umboð okkara í vektflokkinum –81 kg, var Búgvi Poulsen, sum eisini